

- Keypiorkan hjá fleiri virkjum hevur verið lítil, og tí hevur eftirspurningurin eftir ráfiski eisini verið ov lítil, siga ráfiskaseljarar

Mynd: Vilmund Jacobsen

manni í fiskivinnu-og tilfeingismálum, sum hevur sagt, at vinnan skal hava bestu karmar at virka undir.

## Ov lítil kapping

Formaðurin í Ráfiskaseljarunum, Jóhannus Olsen, sum eisini er reiðari og skipaeigari, sigur, at í løtuni hevði tað verið ein hjálp, um avmarkingin við teimum 25% varð tikin burtur.

Hann heldur, at skip og bátar eiga at hava so góðar møguleikar at sleppa av við fiskin sum gjørligt.

- Eru prísirnir betri á marknaðinum uttan fyri Føroyar, eiga vit at kunna fara eftir teimum.

Jóhannus viðgongur, at føroysku fiskavirkini hava verið ófør at bjóða upp á fisk av landgrunninum, men hann ásannar eisini, at í seinastuni hava virkini havt trupulleikar við at tikið undan, sum hann tekur til.

- Av ymiskum orsøkum hava vikini ikki havt so góða keypiorku í seinastuni, sum tey helst skuldu havt, og tí hava tey heldur ikki havt somu møguleikar at bjóða á fiskamarknaðinum.

Hann sigur, at úrslitið, vit hava sæð í seinastuni, er, at kappingin um ráfiskin hevur verið ov lítil, og hetta hevur so aftur gingið út yvir fiskaprísirnar – øvuta vegin.

## Viðurskiftini broytt

Jóhannus Olsen sigur, at orsøkin til, at tey 25%, sum skipini kunnu landa uttanlands, ikki hava verið so nógv frammi í almenna kjakinum, er, at virkini sum heild hava klárað seg væl í kappingini um fiskin á marknaðinum.

- Vit hava kunnað fingið tann prís fyri fiskin í Føroyum, sum vit hava havt brúk fyri. Virkini hava klárað seg væl í kappingini, men soleiðis hevur ikki verið í seinastuni.

Hann ásannar, at soleiðis, sum keypiorkan og prísirnir hava verið á føroyska fiskamarknaðinum í seinastuni, hevur avmarkingin í søluni uttanlands verið ein trupulleiki.

- Vit kunnu ikki fara fleiri túrar í slag av landinum við fiskinum, tí tá koma vit beinanvegin undir loftið við teimum 25%.

Jóhannus Olsen sigur, at tað eru skipabólkar, sum í seinastuni hava havt brúk fyri at farið av landinum, nú stórur partur av føroysku fiskavirkjunum hava verið í aldudali og hava havt torført við at fáa raksturin at hanga saman.

## Av landinum

Vit spurdu eisini Jóhannus Olsen, um vandi ikki er fyri, at allur ráfiskurin av landgrunninum fer av landinum, um avmarkingarnar verða avtiknar.

- Nei, tað halda vit ikki. Vit vilja sleppa at selja fiskin, har vit fáa besta prísin fyri hann, og tað hevur – sum eg segði – verið gleðiligt at sæð, at føroysku virkini hava staðið seg væl í kappingini og enntá hava havt besta prísin.

Hann sigur, at føroysku virkini hava verið rættiliga dugnalig at bjóða upp á fiskin, men skip og bátar mugu hava møguleikan – um prísirnir eru betri uttanlands – at fara av landinum við einum størri parti av fiskinum enn teimum 25%.

- Nú eftirspurningurin í Føroyum er minkaður, er hetta ikki minst umráðandi í løtuni, sigur Jóhannus Olsen, reiðari og formaður í Ráfiskaseljarafelagnum.

Í blaðnum mánadagin fara vit at hava eina viðmerking frá Ráfiskaseljarafelagnum um úttalilsini hjá formanninum í Ráfiskakeyparafelagnum.

# Fiskimenn meira bevístir um trygd

**Danskir fiskimenn eru í dag so fokuseraðir um gott arbeiðsumhvørvi, at hetta nú eisini sæst aftur í hagtølum - við nógv færri álvarsligum vanlukkum umborð á skipum og bátum**



*Fiskimenn eru vorðnir meira bevístir um trygd á sjónum*

Mynd: Røgvi K. Mouritsen

FISKIMENN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Danska Sjóferðslustýrið er komið við tølum fyri 2007 sum vísa, at einans 14 álvarsamar arbeiðsvanlukkur hendu umborð á donskum skipum og bátum í 2007. Við øðrum orðum merkir hetta, at bert tríggir av hvørjum 1000 fiskimonnum verða raktir av arbeiðsvanlukkum í eitt ár.

Hetta tal er nógv minni enn tølini fyri sigling í aðrari vinnu enn fiskivinnuni.

Taka vit skip niðanfyri 3.000 tons, vísa tølini, at í miðal 9,9 av hvørjum 1000 siglandi eru fyri skaðum og við skipum, sum eru størri enn 3.000 tons, er talið 6,7 í miðal fyri hvørji 1000 sjófólk.

Ein av teimum, sum fylgir væl við, hvussu gongur á hesum øki í fiskivinnuni, er Mogens Nielsen, stjóri í Fiskeriets Arbejdsmiljøråd, og hann ber fiskimonnum stórt rós.

- Fiskimenn taka trygdina í stórum álvara, og tað eru ikki onnur enn fiskimenninir sjálvir, sum taka sær av trygdini umborð á fiskiskipunum, sigur hann.

Tølini yvir arbeiðsvanlukkur umborð á fiskiskipum eru fallin í stórum stigum seinastu fýra árini..

Í 2001 og 2002 var talið av álvarsligum arbeiðsvanlukkum umborð á fiskiskipum 53. Í 2003 minkaði tað niður í 46, og í 2004 var talið 30.

Í 2005 vóru danir niðri á 27 arbeiðsvanlukkum fyri hvørjar 1000 fiskimenn – og í 2006 var talið 24.

Metstóra minkingin var í 2007, tá talið av álvarsligum arbeiðsvanlukkum umborð á donskum fiskiskipum bert var 14.

Mogens Nielsen er sannførdur um, at ein orsøk til minkingina er trygdarskeiðið, sum tekur tríggjar vikur, sum yngra ættarliðið tekur, áðrenn lagt verður út á hav.

